# Tann konservativi ferðamaðurin



*Síðani seinnapartin í gjár hevur pávin ligið "lit de parade" í Pæturskirkjuni*

*Mynd: Reuters*

**Jóhannes Páll pávi Annar hevði eitt opið sinnalag, sum gjørdi hann væl umtóktan, men hansara støðufesti á ávísum økjum elvdi samstundis til klandur og spjaðing í katólsku kirkjuni víða um heimin**

EFTIRMÆLI

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tá polski kardinalurin Karol Wojtyla sum tann 265. í røðini bleiv valdur til páva tann 16. oktober í 1978, vóru tað fá uttan fyri leiðsluna í katólsku kirkjuni, sum vistu um mannin. Uppaftur færri dugdu at siga, hvussu hann mundi fara at roynast, ella hvørji sjónarmið mundu fara at eyðkenna virksemi hansara, men hesi og øll onnur lærdu skjótt, at sermerkið hjá tí nývalda pávanum var eitt støðufesri, sum er fáum øðrum unt. Hann fjaldi seg ikki fyri fjølmilunum og legði seg út í nógvar verðsligar spurningar, men aftan fyri alt lá trúgvin á tann ósvikaliga sannleikan.

Jóhannes Páll pávi Annar var kirkjuleiðari við øllum tí, sum tað ber í sær av umsiting, diplomatii og praktiskum politikki, men hann var fyrst og fremst tann stóri boðarin.

– Av sínum tíggju fingrum hevur Jáhannes Páll Annar brúkt teir níggju til at boða evangeliið við og ein til at stýra kirkjuni við. Hann er ein apostlapávi, og í hansara eygum er boðanin um Jesus Kristus grundarlagið undir øllum, skrivaði italska blaðið Corrieres della Sera, tá pávin hátíðarhelt sín 25. ára starvsdag í 2003.

## Ungur trúgvadi

Karol Józef Wojtyla var føddur í polsku bygdini Wadowice nærhendis býnum Krakow í 1920. Pápi hansara var yvirmaður í polska herinum og royndi sum frægast at lívbjarga sær og sínum við teirri ússaligu lønini.

Longu sum smádrongur misti tann ungi Karol fleiri av sínum næstu, og tað gjørdi, at hann, sum var uppvaksin í terri kristnu trúnni, fekk serligan áhuga fyri líðing og deyða. Men hóast hann nýtti fleiri tímar hvønn einasta dag til at hugsa um hesar spurningar og til at biðja, var hann sera virkin bæði sum ítróttarmaður, sjónleikari og skald.

Tá hann nærkaðist teimum 20, fekk trúgvin av álvara fastatøkur á honum, og sum 22 ára gamal slapp hann á ein loyniligan prestaskúla. Um hetta mundið var Póland hersett, og nazistarnir høvdu sett prestaskúlunum forboð fyri at taka nýggjar lesandi. Men í 1946 var Karol liðugur við útbúgvingina og bleiv prestvígdur.

Sum prestur og seinni sum biskupur og kardinalur undir kommunistastýrinum hevði Karol Wojtyla einki samband við teir, sum sótu við valdið, men hann setti seg heldur ikki upp ímóti teimum og eggjaði heldur ikki øðrum til at gera tað. Tíðin var heldur ikki búgvin til tess, og eitt tílíkt stríð hevði ivaleyst verið nyttuleyst tá.

## Legði á annan bógv

Tann 28. september í 1978 doyði Jóhannes Páll pávi Fyrsti brádliga eftir at hava sitið 33 dagar í pávastólinum. Tann 14. oktober vórðu kardinalarnir stongdir inni í Sixtinska Kapellinum at velja eftirmann hansara, og bara tveir dagar seinni boðaði tann hvíti roykurin úr skortsteininum á Vatikaninum frá, at ein nýggjur pávi var valdur.

Tá høvdu kardinalarnir atkvøtt fleiri ferðir, uttan at nakar teirra kundi fáa teir neyðugu tveir triðingarnar av atkvøðunum. Hetta komst av, at teir italsku kardinalarnir kundu ikki semjast, og so hendi tað, at erkabiskuppurin í Wien, kardinalurin Franz Kønig, fekk sínar starvsbrøður úr Fraklandi, Spania, USA, Týsklandi, Eysturríki, Niðurlondum og teimum miðevropeisku londunum at atkvøða fyri Karol Wojtyla. Franz Kønig hevði undan valinum mælt sínum starvsbrøðrum til at velja ein ungan páva og helst ein úr Miðevropa. Hann man hava rikið væl, tí aftan á bara tvær atkvøðugreiðslur fekk

*– Uttan hann hevði kommunisman ikki fallið. Í hvussu er hevði fallið verið seinkað nógv, og so hevði fallið verið blóðugt.*

(Lech Walesa, fyrrv. polskur forseti)

*– Tann katólska kirkjan hevur mist sín hirða, og heimurin hevur mist ein friðarstríðsmann. Vit fara altíð at minnast tann eyðmjúka, klóka og djarva prestin, sum gjørdist ein tann størsti moralski leiðarin í søguni.*

(George W. Bush, forseti)

*– Hann var vinur teirra fátæku. Uttan hansara luttøku hevði tiltakið at skarva av skuldini hjá teimum fátæku londunum ikki givið tað úrslit, sum tað gav.*

(Bono, tónleikari og friðarmaður)